Autismufelagið

100 Tórshavn
tlf 509031 – www.autisma.fo

Til:
Trivnaðarnevndina
Føroya Løgting
Formansskapin í Løgtinginum
Politisku flokkarnar

Tórshavn, 6. oktober 2023

Viðmerkingar til LM-023/2023:
Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, (Frávik um stuðulsveiting til lesandi í útbúgvingaraldri strikað)

Fyri okkum í Autismufelagnum kom tað sera dátt við, brádliga at gerast varug við, at omanfyri nevnda lógaruppskot varð lagt fram, uttan at verða sent til hoyringar hjá viðkomandi pørtum.

Hóast ikki eftirspurd, vilja vit tó við hesum loyva okkum at gera viðmerkingar til málið, orsakað av at hetta, verður tað samtykt, fer at raka ein part av okkara ungu limum sera meint.

Tíverri hava vit, sum óløntir nevndarlimir í einum áhugafelag, ikki stundir til at hyggja so gjølla at uppskotinum, sum vit fegin vildu. Her fáa tit tó okkara íkast.

Tykkum kunnugt liva vit í eini tíð har prísvøksturin hevur verið, og framvegis er, rættiliga stórur og júst í hesum tíðum verður steinur lagdur omaná byrðu hjá ungdómum, ið bera brek, við at taka eina veiting frá teimum, sum hevur til endamáls at kompensera fyri teirra tarni.

Fyri at hetta skriv ikki skal gerast alt ov drúgt vilja vit heita á tykkum um sjálvi at lesa viðmerkingarnar til lógaruppskotið, LM-177/2011, serliga frá síðu 33 til 40, sum snúgva seg um §8 til og við §13, til tess at seta tykkum inn í, hvat endamálið var við lógini, tá talan er um okkara málbólk.
Vit vilja tó taka onkra viðmerking við niðanfyri.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, LM-023/2023, stendur at lesa:
"1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at tálma útreiðsluvøkstri landskassans. Endamálið er somuleiðis at javnseta stuðulin til næmingar við serligum tørvi við næmingar, ið ikki hava serligan tørv."

Hetta er tó beinleiðis í andsøgn við verandi lóg, Løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, har tað í viðmerkingunum til lógaruppskotið, LM-177/2011, á síðu 39, stendur at lesa: (okkara undirstrikan)
"Til § 13
Stk.
2 Endamálið við arbeiðsbúgving er at kompensera fyri, at viðkomandi persónur hevur nakr ar avbjóðingar, ið gera fyritreytirnar verri hjá honum at gagnnýta møguleikarnar, sum samfelagið annars hevur í sambandi við útbúgving. Men endamálið er ikki við stuðli at gera fyritreytirnar
betri enn hjá persónum í samfelagnum annars, ella at frátaka øðrum myndugleikum ábyrg d sambært galdandi lóg."

Autismufelagið

100 Tórshavn

tlf 509031 – www.autisma.fo

Sostatt verður talan ikki um javnseting, men heldur verður talan um munandi verri umstøður fyri tey við serligum tørvi, við tað at veitingin verður tikin frá teimum.

Tað er tíverri ikki soleiðis, at brekið hvørvur og ein brádliga verður førur fyri at arbeiða, av tí at ein veiting verður lækkað.

Ein onnur avleiðing av uppskotinum tykist heldur løgin, tí í núverandi lóg, veitir AV fulla veiting fyri 12. mánaðin, sambært §13a, stk. 2, og viðførir hetta enn ein miss fyri okkara málbólk, sum onga veiting fær fyri sama mánaða.

Fara vit víðari í viðmerkingunum til LM-023/2023, sæst at næmingar, sum hava fingið játtað stuðulsveiting, fara at móttaka veitingina til fyriskipanin endar.
Av tí at ein slík fyriskipan kann setast í verk fyri fólk, yngri enn 18 ár, kann hetta hava ein stóran ójavna við sær, millum næmingar i sama flokki, við eins fyritreytum annars, sum kann vara í fleiri ár, sum einans kemst av, at onkur longu var í eini fyriskipan, meðan onnur ikki vóru.

Annað er, at fyri fólk við autismu kann hugsast at fleiri teirra eru blivin fevnd av Løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, umvegis Løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2022, §§ 11 og 12.
Hesi ungu fara sostatt at missa áleið helmingin av verandi veiting eftir Ll. 72, um tey, sum lógin leggur upp til, fara undir útbúgving og harvið verða fevnd av Ll 63 um arbeiðsfremjandi tiltøk, um ætlaða broytingin verður samtykt.

Verður hugt nærri at viðmerkingunum til Løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2022, LM-079/2019, sæst at brekrættindi hava høga raðfesting. Tað er ov rúgvusmikið at seta alt inn her, tí verða bert nøkur brot endurgivin her, til tess at lýsa andan í lógini: (okkara undirstrikan)

"Endamálið við lógaruppskotinum er, at samfelagið hevur eina lóggávu, har tænastur og veitingar verða veittar við støði í tørvi og ynski borgarans, í mun til egna lívsstøðu, og soleiðis, at borgarin, hóast tarn ella sjúku, fær eitt, fyri hann, nøktandi og innihaldsríkt lív." S. 19

"Ásetingarnar eiga at lesast í samanhangi við reglurnar í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum hava til endamáls at fyribyrgja, at fólk enda varandi uttanfyri arbeiðsmarknaðin. Útgangsstøðið fyri stuðulsskipanum á arbeiðsmarknaðinum er, at tað almenna hevur skyldu til - í staðin fyri óvirkna hjálp til uppihald - at bjóða virkna hjálp sum eitt nú at útvega arbeiði og menna ella endurmenna arbeiðsevnini, soleiðis at viðkomandi kann gerast førur fyri at uppihalda sær og sínum við at arbeiða. Veitingin til tey, sum eru í fyriskipan sambært lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, er eitt vet hægri enn forsorgarhjálpin." S. 23

"1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Lógaruppskotið um almannatrygd og tænastur tekur støði í brekpolitisku grundreglunum um endurbót (kompensatión), geiraábyrgd, samhaldsfesti og javnviðgerð, sum er grundarlagið undir Sáttmála sameindu tjóða um rættin hjá einstaklingum, ið bera brek, sum Føroyar tó ku undir við í 2009." S. 37.

"2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið fevnir um Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek (Breksáttmálin).

Autismufelagið

100 Tórshavn

tlf 509031 – www.autisma.fo

Við lógaruppskotinum verða krøvini, sum eru ásett í Breksáttmálanum, ment við tað, at lógaruppskotið umframt at nágreina rættin til verandi sosialar tænastur eisini heimilar, at nýggjar sosialar tænastur verða veittar fólki, ið bera brek. Endamálið við at veita fleiri sosialar tænastur er at tryggja sjálvbjargni, lætta um gerandisdagin og tryggja, at persónar, ið bera brek, kunnu verða við í samfelagnum." S. 68

"Endamálið við lógini er eisini at virka sum niðasta trygdarnet fyri persónar, ið hava troytt verandi møguleikar og ikki kunnu uppihalda sær og familjuni á annan hátt. Eisini er endamálið við lógini at veita persónum, ið bera brek, eru sjúk ella hava víðfevndar sosialar trupulleikar, neyðugar tænastur og endurbót (kompensatión) fyri at bøta um avleiðingarnar av brekinum ella sjúkuni."

Samanumtikið tykist hetta at vera eitt lógaruppskot, sum er skundað ígjøgnum, uttan stórvegis fyrilit fyri borgaran við breki.

Hædd er ikki tikin fyri, sambært viðmerkingunum, um útreiðslurnar til fyritíðarpensjón hækka, sum ein avleiðing av uppskotinum.

Hædd er heldur ikki tikin fyri, at hetta møguliga kann hava við sær, at ungdómur við autismu heilt frávelur at søkja um upptøku í Autismuflokk, Serligt Skipað Miðnám ella aðrar útbúgvingar. Hetta hóast mong teirra, eftir lokna fyriskipan, eru før fyri at koma í arbeiði og harvið vera við til at halda samfelagnum koyrandi.

Fyri hesi ungu er tað, í stóran mun, ikki ein møguleiki at hava eitt frítíðararbeiði við síðuna av skúlagongd. Tey fara tískil at hava serstakliga ringar møguleikar til, eitt nú at fáa ráð til bøkur, tilfar og serliga námsferð, sum enntá kann vera kravd.
Hetta er ikki minst galdandi nú prísirnir eru hækkaðir ógvusliga gjøgnum longri tíð.

Fyri foreldrini merkir tað eisini, at teimum verður áløgd ein forsyrgjaraskylda, eisini eftir at teirra barn er fylt 18 ár. Hetta kann kennast mannminkandi fyri hesi ungu fólk, sum eins og onnur ung, ynskja at forsyrgja sær sjálvum.

Havast skal eisini í huga, at mong av hesum longu ynskja at standa á bíðilista til hóskandi bústaðir, sum tíverri ikki eru til, og nú skal tilverugrundarlagið so eisini skerjast munandi.

Fyri okkum í Autismufelagnum er tað púra óskiljandi at eitt slíkt uppskot kann verða lagt fyri Føroya Løgting heilt uttan virðing fyri teimum, ið rakt vera.

Ongin lógarkravd hoyring hevur verið og lógaruppskotið ger seg inn á brekrættindi, sum eru staðfest í verandi lógarverki.

Vit heita tí inniliga á Føroya Løgting um at burturvísa lógaruppskotið, ella í øðrum lagi, á allar løgtingslimir um ikki at samtykkja lógaruppskot LM-023/2023.

Virðingarmest,

Nevndin í Autismufelagnum